**UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ**

# Fyrstilærari í Kaldbaks skúla

**Uttanríkis- og mentamálaráðið sóknast eftir einum dugnaligum leiðara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær leiðslustarv í føroyska fólkaskúlanum**

Starvið sum fyrstilærari í Kaldbaks skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2022. Í Kaldbaks skúla eru 24 næmingar í 1. - 6. flokki og 6 næmingar í forskúla. Tríggir lærarar starvast í skúlanum umframt vaskifólk og húsavørður.

Frá skúlaárinum 2022/23 verður forskúli / forskúla-líknandi tilboð í Kaldbaks skúla.

**Um starvið**

Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans. Høvuðsuppgávurnar eru:

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at virka fyri trivnaði og góðum samstarvi við atliti at næmingum og starvsfólki skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.
- At umsita fíggjar-, rakstrar- og málsstýring skúlans

**Samstarvsskipan í Tórshavnar kommunu**

Fyrstlærarin virkar í tøttum samstarvi við mentamáladeildina og trivnaðarfyrisitingina, umframt við aðrar deildir í kommununi eftir tørvi. Skipað samstarv er millum skúlaleiðararnar, har dentur er lagdur á, at skúlaleiðararnir í felag virka fyri at menna skúlaskapin í kommununi og samstarvið við avvarðandi partar.

**Førleikakrøv**

- Umsøkjarar skulu hava læraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum
- Leiðsluroyndir og skeið innan leiðslu eru ein fyrimunur
- Dugir at orða seg á góðum føroyskum máli og kann undirvísa í støddfrøði
- Hevur áhuga fyri avbjóðingum og førleika at taka neyðugar avgerðir

**Setanarviðurskifti**

Setanarøkið er undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Kaldbaks skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum, sum eisini fata um møguligar bygnaðarbroytingar.

Starvið er flokkað í lønarflokki 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**

Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og viðmælum skal verða Uttanríkis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi **30. juni 2022**.

Sambært § 4, stk. 3, sbr. stk. 1 í løgtingslóg um barnaváttanir skal greitt tilskilast í starvslýsingum, at arbeiðsgevari hevur skyldu til at útvega barnaváttan, áðrenn setan verður framd. Tískil verður hervið kunnað um, at Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur skyldu til at útvega barnaváttan, áðrenn viðkomandi persónur, ið stendur til at fáa starvið sum fyrstilærari í Kaldbaks skúla, verður settur í starvið. Í hesum sambandi verður eisini víst til kunning og vegleiðing á heimasíðu ráðsins, sbr. vegleiðing-um-barnaváttanir.docx (live.com).

**Umsóknin verður stílað til:**

Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 5-7
Postrúm 3279
110 Tórshavn
ella við t-posti: ummr@ummr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044.

***Uttanríkis- og mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál, gransking og uttanríkismál. Harafturat eru uppgávur m.a. viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og øðrum frítíðarvirksemi.*